

Eminem verður lýstur ið mynd hjá Beintu av Reyni



Steinprent hjá Bjarna Werner Sørensen



Mikinespýramidan er vorðin grá



Prent hjá John Olsen



Tann eldra myndlistin ið byrjanini av framsýningini



Andlitsmyndir hjá Mikines



listasavnið feb09

serliga umráðandi í føroyskari listasøgu. Og brádliga veitst tú hvat tað er, sum er púra galið: HVAR BLEIV SAMTÍÐARLISTIN AV? Tað tykist fullkomiliga skilaleyst at seta eina framsýning av føroyskari list upp uttan: Zacharias Heinesen, Torbjørn Olsen, Olivur við Neyst, Amariel Norðoy, Eyðun av Reyni, Anker Mortensen, Hanna Bjartalíð, Hansinu Iversen, Rannvá Kunoy, Øssur Johannesen, Sigrun Gunnarsdóttir, Tummas Jákup Thomsen osfr. Allíkavæl er eingin av hesum nevndu listafólkunum umboðað á teirri nýggju permanentu framsýningini í Listasavni Føroya. Vit vita øll, at Listasavnið er vorðið ov lítið og ætlaðar útbyggingar av savninum fara heilt vist at hjálpa uppá verandi trupulleikar. Men hetta broytir ikki upp á støðuna nú hendan nýggja fasta framsýningin fullkomiliga ignorerar ein bróðurpart av tí bestu føroysku myndlistini. Hugskotið at gera eina serframsýning við einum útvaldum listafólki í tí fyrstu pýramiduni er gott, tó at tað sjálvandi ikki bøtir um grundleggjandi trupulleikan við samtíðarlistini. Hendan presentatiónin av myndum hjá Tróndi Patursson tykist harumframt heldur tom fyri ikki at siga tóm. Her eru rættiliga fá verk við, men verri er, at verkini ikki eru særliga umboðandi fyri samlaða verki hjá Tróndi. Um eg sigi, at framsýningin hvørki inniheldur nakran av teimum eyðkendu ultramarinbláu málningunum og ei heldur nakað glasverk, skilir lesarin helst hvat eg meini við.

## Onkur góð mynd hjá Torbjørn Olsen hongur í Mentamálaráðnum...

Antin hevur gestsins eyga í hesum førinum ikki víst seg at vera nóg gløgt, ella hevur danski listfrøðingurin ikki havt nóg gott tilfar at arbeiða við soleiðis at skilja, at tey góðu samtíðarverkini ikki hava verið tøk á savninum, tá hon valdi út. Uttan at vita tað fyri vist, havi eg ein varhuga av, at mong av teimum góðu samtíðarlistaverkunum, sum eru ogn hjá Listasavninum eru leigað ella lænt út til ymiskar almennar stovnar. Hvussu er og ikki má framsýningargesturin bara staðfesta, at sum tað sær út nú, tykist savnið heilt einfalt ikki nóg gott í mun til høvuðsendamál Listasavnsins, ið netupp er at keypa og fáa til vega listaverk og at sýna fram føstu framsýningina í Listaskálanum. Savnið er opið týsdag til sunnudag frá klokkan 14.00 til 16.00.